# FRAMSÝNING 2002

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli hevur framsýning í**



# KOLLAFIRÐI



**Leygardagin 16. mars kl. 15.00 - 19.00**
**Sunnudagin 17. mars kl. 15.00 - 19.00**

**Í Kollafjarðar skúla - fimleikarhøllini og í gamla skúla (vevnaður)**

Eisini verður tónleikur og kórsangur



**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**

# Skeið í sorg og kreppu

Treytað av nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið:

**Í døgunum 29. apríl til 3. mai 2002 kl. 8⁰⁰–14⁰⁰**

| | |
|---|---|
| **Innihald:** | Ynski hjá álvarsliga sjúkum fólki at verða sína síðstu tíð í egnum heimi veksur støðugt. Hesir sjúklingar og teirra avvarðandi hava ein stóran tørv á sosialum og psykiskum stuðli. Hetta setir nýggj og tíðarkrevjandi krøv til tey, ið arbeiða innan heimaróktina. |
| **Endamál:** | At verða førur fyri at røkja bæði praktiskar, sosialar og psykologiskar uppgávur saman við tí sjúka og avvarðandi í heiminum. |
| **Málbólkur:** | Heimahjálparar, sosial- og sunnheitshjálparar, sjúkrahjálparar. |
| **Skeiðleiðari:** | Vibeke Jensen frá skúlanum í Hammer Bakker. |
| **Stað:** | Skúlaheimið við Marknagilsvegin. |
| **Kostnaður:** | kr. 3.500,–íroknað frálæru, skeiðtilfar, og mat. |
| **Tilmelding:** | ***Áðrenn 29. mars 2002.*** |

Boðað verður frá luttøku við at venda sær til Skeiðsdepilin á tlf. 318813 (mánadag –fríggjadag, kl. 8⁰⁰-12 ⁰⁰ & 13⁰⁰-16 ⁰⁰).

**SKEIÐSDEPILIN við Marknagil**
Marknagilsvegur 77 • P. O. Box 177 • FO-110 Tórshavn
Fax: 313374 • t-postur: mb@hsh.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Pedagogur

Søkt verður eftir avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvið at arbeiða 40 tímar um vikuna. **Starvið er frá 15. apríl 2002 til 31. januar 2003.**

Starvið inniber at umsøkjarin er opin fyri at fylgja tí tilrættalagda arbeiðinum, má kunna arbeiða skiftandi tíðir, bæði kvøld- og náttarvaktir, má kunna arbeiða sjálvstøðugt og kunna samstarva.

Arbeiðsplássið er eitt sambýli har 5 menningartarnað fólk búgva.

Løn og setunarviðurskifti eru samb. sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið sett av fólki við øðrum førleika

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við leiðaran á tlf. 374074

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2002

Umsóknir skulu sendast til:

**Sambýlið á Bárðarfløtti**
FR-900 Vágur
Att: Leiðarin
Tlf. 374074

# Bilur til sølu



Ein sera væl hildin Renault Mégane 2.0 Classic til sølu.
Bilurin er ljóst metallgrønur og er væl útgjørdur við t.d. aircondition, informatiónsdisplay, fjarstýrt radio v. bandspælara, velour setur v. hita, úti-termometur og oljutjekk í instrumentborðinum, sólgardinum til bakrútin o.am.a. Eyka dekk fylgja við. Nýsynaður. Bert ein eigari.
Koyrt 41.700 km, árg. aug. 97, prísur kr. 115.000,–

**Tlf. 313979 ella 213979**

# Seyðahús í Fuglafirði til sølu

Stórt nýmótans seyðahús í Fuglafirði til sølu um hóskandi boð fæst.

Húsini kunnu yvirtakast í mai/juni í ár.

Áhugaði biðjast ringja á

**tlf. 282722 eftir kl. 17**

Sosialurin -har tað hendir

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**



TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Grundskeið fyri hjálparfólk í vøggustovu og barnagarði

Treytað av nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið:

**Í døgunum 13/5 til 31/5 - 2002**

| | |
|---|---|
| **Skeiðið er ætlað:** | Fólki, ið ikki hava pedagogiska útbúgving, men sum arbeiða í, ella ynskja at arbeiða í barnagarði ella vøggustovu. |
| **Endamál:** | At geva kunnleika til at kunna koma inn í tað pedagogiska arbeiði út frá vitan um førleikar hjá børnum og alla teirra lívsstøðu. At geva innlit í samfelagsligar uppgávur og lógargrundarløg, rættindi og pliktir í tí dagliga arbeiðnum hjá einum stovni. At vísa, hvussu fólk kunnu taka virknan lut í dagligu viðurskiftunum millum børn, foreldur og starvsfelagar. |
| **Kostnaður:** | 8.250,00 kr. iroknað frálæru, skeiðtilfar og mat. |
| **Skeiðleiðari:** | Lærari frá pedagog-lærara-skúlanum CVU-Vest í Danmark. |
| **Tilmelding:** | Áðrenn 1. april 2002 |

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skeiðsdepilin á tlf 318813 (mánadag - fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16)

**SKEIÐSDEPILIN VIÐ Marknagil**
Marknagilsvegur 77 - P.O.B. 177
FR-110 Tórshavn - Fax: 313374
Teldupostur: mb@hsh.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Starvsfólk til heimavitjanartænastuna

Fyri at betra um trivnaðin og tryggleikan í gerandisdegnum hjá eldru borgarunum í kommununi, hevur Tórshavnar kommuna samtykt at seta heimavitjanartænastu á stovn.

**Endamálið við tænastuni er m.a:**
- at vitja regluliga í heiminum hjá teimum gomlu
- at práta um gerandisdagin
- at veita heilsuvegleiðing um trivna og menning
- at kunna um mongu og fjølbroyttu tilboðini og tiltøkini í kommununi
- at fáa tey gomlu at vera virkin í frítíðini
- at gerandisdagurin kann fáa størri lívsinnihald

Starvið umfatar eisini at samskipa visitatiónina til ellisheims-, røktarheims- og sambýlisplássini í kommununi.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at virka í tøttum samstarvi við kommunulæknarnar og heimarøktina.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarin:
- er útbúgvin sjúkrasystir ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- hevur royndir frá arbeiði við gomlum fólki
- er fyrikomandi og álitisvekjandi
- hevur umsitingarligar royndir

**Starvs- og setanarviðurskifti**
eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið, sum kann vera eitt fulltíðar- ella tvey hálvtíðarstørv, verður skipað undir trivnaðarfyrisitingini í Tórshavnar kommunu.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Hjálparfólk

Frítíðarskúlin Skt. Frans søkir eftir einum hjálparfólki 22 tímar um vikuna, í 3 mánaðar, frá 1. apríl til 1. juli 2002. Arbeiðstíðin er millum kl 11.00 og 17.00.

**Stovnslýsing**
Stovnurin er normeraður til 48 børn í aldrinum 6-7 ár. Hølini eru í trimum hæddum. Á loftinum eru 20 børn, í miðhæddini 28 børn, í kjallaranum er verkstaður og spælirúm til felags nýtslu.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin dámar væl at vera úti við børnunum. Kann arbeiða sjálvstøðugt, er førur at skipa fyri og taka avgerðir í arbeiðinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmálanum millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Mariu Heinesen, leiðara tlf. 314364 ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um royndir skulu sendast til Frítíðarskúlan Skt. Frans, Stoffalág 60, 100 Tórshavn

SNARSKIVAN

***Av tí, at lýsingin í hósdagsblaðnum er komin skeivt fyri, verður hervið lýst av nýggjum***

# Pleygufamilja

Søkt verður eftir pleygufamilju til eina unga mammu við einum barni.

Málið við pleygufamiljuni er at virka fyri einum tryggum og mennandi uppvøkstri, eins og at stuðla mammuni og barninum.

Arbeiðið verður eisini skipað í samráð við avvarandi barnavernd.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært galdandi reglum.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. mars 2002 og skulu stílast til:

**Almannastovan**
Eysturoyar deild
Att.: Bettina Christiansen, sosialráðgeva
Heiðavegur
600 Saltangará

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf. 448260.

# Timbur- og umvælingararbeiði

Alt timburarbeiði og umvælingararbeiði verður gjørt.

**Sp/f JK-bygging**
Tlf. 315868 –211828

**DYNAPAC**
*-maskinurnar sum halda!*



- Asfaltleggjarir
- Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
- Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum til betong/stoyping
- Glittemaskinur
- Dykpumpur
- Eykalutir

*Keyp góðsku – keyp Dynapac!*

Sosialurin - 311820

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

**Sosialurin**
Lesið Sosialin - tað loysir seg